## Vinnulívið í Suðuroy tekur saman hendur

**– Á fundi í Vági fríggjakvøldið varð semja um, at einasta gongda leiðin er at stovna eitt vinnuráð fyri alla Suðuroy**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Einasta gongda leiðin er at vinnulívið í allari Suðuroynni samstarvar.

Tað var niðurstøðan á einum fundi fyri vinnulívsfólk í Suðuroy fríggjakvøldið.

Tað varð Vinnuráðið í Suðuroyar Syðru helvt, sum hevði bjóðað vinnulívsfólki í allari oynni á fund at viðgerða vinnuligu støðuna í oynni.

Umframt Vinnuráðið í Suðuroyar Syðru Helvt, er eisini Suðuroyar Oljuvinnuráð, sum mest er mannað við fólki av Tvøroyri og aðrastaðni í norðaru helvt í Suðuroy.

Men á fundinum fríggjakvøldið var full semja um, at einasta gongda leiðin er at gera eitt vinnuráð fyri alla Suðuroynna, sigur Alex Vilhelm, sum er í Vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt.

Hann sigur, at fundurin var ógvuliga jaligur og góður og at ta var full semja um, at tað var einasta gongda leiðin fyri at skapa menning.

Fundurin valdi eisini ein bólk at fyrireika stovnanina av einum Suðuroyar vinnuráðið. Í hesum bólkinum sita Tim Wentzlau og Jòn Guttesen á Tvøroyri, Arnbjørn í Smiðjuni í Fámjin og Mikkjal Sørensen, í Porkeri, sum eisini hevur verið stjóri í Suðuroyar Sparikassa í mong ár.

Alex Vilhelm sigur eisini, at virka fyri, at kommunurnar og vinnulívið í oynni seta ein felags vinnustjóra ella menningarstjóra, sum skal virka fyri vinnumenning í allari oynni.

Uppundir fundin hava Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur gjørt eitt uppskot um eina vakstraravtalu fyri Suðuroynna og fundurin samtykti at heita á kommunurnar og landsmyndugleikarnar gera eina slíka vakstraravtalu fyri Suðuroynna.

Landsstýrið hevur strongt á at fáa suðuroyingar at taka seg saman í eitt felag á nógvum økjum so at landsins myndugleikar hava ein myndugleika í Suðuroynni at samskifta við og ikki fleiri felagsskapir, sum allir draga í sína ætt.



*Fyrireikingarbólkurin av Faroe Expo. Frá vinstru: John Eli Olsen, Regin Jacobsen, Rodmund Nielsen og Símun Hammer*

# Stór útflutningsráðstevna í Runavík

**Tann 25. - 27. oktober verður skipað fyri einari útflutningsráðstevnu í Runavík. Yvirskipaða endamálið við FARO-EXPO 05 er at varpa ljós á førleikan hjá føroyskum útflutningsfyritøkum mótvegis útlendskum samstarvsfeløgum**

STEVNA
*Jonhard Hammer*
*jonhard@sosialurin.fo*

Aðalmálið er at slóða fyri, at luttakararnir á ráðstevnuni kunnu knýta sambond og menna samstarv - sonevnd partenariat. Úrslitið av hesum skal styrkja støðuna hjá vinnulívinum, áhugabólkum og myndugleikum í Føroyum, og sjálvandi styrkja um støðuna hjá luttakarunum annars.

Mentanartiltøk verða ein týdningarmikil kveikjari í gongdini at røkka málunum við ráðstevnuni. Mentanartiltøkini verða skipað á ein hátt, har tey verða samantvinnað við ráðstevnu tiltøkini á ein spennandi, men náttúrligan hátt.

FAROEXPO 05 verður skipað yvir 3 dagar við denti á hesi trý innsatsøki:

- Kontaktpartenariat: at knýta sambond
- Ráðstevna: Fyrilestrar og verkstovur.
- Mentanarpartur: mentanarligt undirhald og events mynda tiltakið

Krøvini til ítøkilig úrslit eiga at verða, at føroysku luttakararnir fáa avtalur í lag, sum arbeiða ímóti teimum málum, luttakararnir hava sett sær fyri í menningarætlanini, umframt at uml. 10% av føroysku luttakarunum fáa ítøkiligar samstarvsavtalur í lag.

### Luttakarar - málbólkar

Fleiri møguleikar eru at troyta, tá tað kemur til luttakarar. Virkisráðgeving metir, at føroysku luttakararnir eiga at taka støðu til, hvørjir útlendskir luttakarar, ráðstevnan skal venda sær til. Fyri at fáa ávirkan á hvørjar útlendskar fyritøkur verða bodnar við, er neyðugt at føroysku fyritøkurnar melda seg til innan 1. apríl.

– Tiltakið vil eftir okkara metan, virka sera mennandi fyri Føroyar sum heild, sigur Símun Hammer frá Faroe Expoog vísir til, at tiltakið fevnir breitt:

Mentan, vinna og samfelag fáa øll nakað burturúr. Tiltakið er fakliga á høgum støðið og verður afturvendandi hvørt ár. Av tí sama gerst tiltakið ein katalysator til at gera nakað við rammurnar fyri slík tiltøk. Vinnan fær knýtt sambond við nýggjar marknaðir, og kommunurnar í økinum fáa eitt gott høvi til at bjóða vinarbýum og mentanarbólkum frá hesum á vitjan. Tiltakið er slóðbrótandi í føroyskum høpi.

Óivað kunnu nevnast onnur positiv árin frá tiltakinum. Tað mest týðandi er tó, at tiltakið verður væl fyriskipað og at byrjað verður í góðari tíð, sigur Símun Hammer.

Tað er Eysturoyar Vinnulívsfelag, sum hevur tikið stig til Faroe Expo saman við Runavíkar kommunu, og tað verður Virkisráðgeving, sum fer at samskipa tiltakið.

– Orsøkin til at vit fara undir hetta tiltakið er, at vit fegin vilja hava slíkar stevnur í Eysturoyarøkinum tí at helmingurin av útflutninginum kemur úr Eysturoynni og Norðoyggjum, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík.



*Símun Hammer frá Virkisráðgeving, er samskipari av Faroe Expo 2005*